# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Faroe Dive, Klaksvík:

## Fýra kavarar fingið prógv

**Tíðindaskriv**

Í vikuskiftinum fingu 4 nemingar prógv sum kavarar frá Faroe Dive í Klaksvík. Teir hava staðið teoretiskar, praktiskar og aðrar royndir innan kaving. Við hesum prógvinum hava teir nú møguleika at kava um allan heim.



*Luttakararnir á myndini eru f.v.: Bergur Mikladal, OWD-kavari Janus Joensen, instruktørur Regin Joensen, OWD-kavari Jógvan Fróði Hansen, og OWD-kavari Jón Ingi Johansen, bjargingakavaralærlingur. Jákup Pauli Joensen OWD-kavari vantar á myndini*

†

### Andlát og jarðarferðir

**Svanhild Johansen,** Strendur, andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi leygardagin, 59 ára gomul. Kistan fer av Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi í kvøld klokkan 19 í Sjóvar kirkju. Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju týsdagin klokkan 13.

Tey, sum vilja minnast Svanhild, kunnu lata Missiónshúsinum á Strondum eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

*Kelda: Útvarp Føroya*

Jona Jensen, Vestmanna:

## Kvinnuligur bilsmiður prógv hjá P/F Meinhardt Arge



*Finnbogi Arge, stjóri hjá P/F Meinhardt Arge, handaði Jonu Jensen, prógvið sum bilmsiður*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Mánadagin 13. juni var innanhýsis samkoma fyri starvsfólkunum hjá P/F Meinhardt Arge í Havn, í samband við at Jona Jensen í Vestmanna fekk prógv sum bilsmiður.

Finnbogi Arge, stjóri, helt talu fyri Jonu og handaði henni prógvið. Hann segði m.a., at Jona er fyrsti kvinnuligi bilsmiður, sum fær prógv hjá fyritøkuni. Hon er sera dugnalig og sýnir stóran áhuga fyri arbeiðinum. Hon hevur prógvað at kvinnuligur bilsmiðir klára seg eins væl og mannfólk – í nøkrum førum enntá betri.

Ein onnur, Elin Durhuus, eisini úr Vestmanna, er í læru sum bilsmiður hjá P/F Meinhardt Arge, hon hevur lært í tvey ár.

### 70 ár

16. juni verður Regin á Rógvu skipari Vestmanna 70 ár. Dagurin verður hildin í heiminun 17. juni frá kl 18.00.

†

Kunngjørt verður, at kæra kona, mamma, vermamma og omma

**Svanhild Johansen**
Strendur

andaðist á Eysturoyar Røktar & Ellisheimi leygardagin, 59 ára gomul.

Kistan fer av Eysturoyar Røktar & Ellisheimi mánakvøldið kl. 19.00 í Sjóvar Kirkju.
Jarðarferðin verður úr Sjóvar Kirkju týsdagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Óli, Sunrid og Jóna**

Tey sum vilja minnast Svanhild, kunnu lata Missiónshúsinum á Strondum, eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Jetta Kirke**
Kaldbak

andaðist og fór til gravar.

Tøkk til samkomur og einstaklingar, sum bóðu fyri henni meðan hon var sjúk.
Tøkk til tey mongu, sum vitjaðu hana, og vístu henni kærleika og umsorgan.
Tøkk til læknar og starvsfólk á B7 á landssjúkrahúsinum, sum vóru um hana seinastu tíðina, og sum vóru so góð við hana.

Tøkk til samkomuna í Evangeliihúsinum í Havn.
Tøkk til samkomuna í Nazaret í Kaldbak.
Tøkk til talarar fyri troystarrík orð.
Tøkk til urguspælarar, sangarar og berarar.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk fyri fjarrit, kort og aðrar heilsanir.
Ein serstøk tøkk til tykkum, sum skipaðu fyri ervinum.
Hjartans tøkk til tey mongu, sum fylgdu henni til gravar.
Harrin signið tykkum øll.

**Álvur - Petur, Adelaid og Rebekka -
Ingi og Kathryne -
Rúni, Jana, Jón, Signar, Iris, Elisabet, Sarah og Anja**